Til Rættarnevnd Løgtingsins

Undirritaðu ljósmøður koma við hesi áheitan.

Sum kunnugt liggur lógaruppskot um nýggja fosturtøkulóg í Løgtinginum í løtuni (LM-088/2023), og vit hava skilt, at málið er beint Rættarnevndini.

Vit hava lagt til merkis, at ongin áseting er í lógaruppskotinum, ið, eins og § 102 í donsku sundhedsloven, gevur heilsustarvsfólki rætt til ikki at fremja, ella ikki medvirka til at fremja, fosturtøkuinntriv, um hetta býður teirra sannføring ímóti.

Ein lógartryggjaður rættur fyri heilsustarvsfólk til ikki at medvirka til fosturtøkuinntriv - har ið summar av undirritaðu hava eina samvitsku, ið ikki loyvir hesum - hevði verið sámilig trygd og sámiligt samvitskufrælsi í okkara samfelagi eftir okkara áskoðan.

Við hesum heita undirritaðu tískil á Løgtingsins Rættarnenvd um at virka fyri, at heilsustarvsfólk fáa lógartryggjaðan rætt og lógartryggjað samvitskufrælsi at virka undir, eins og heilsustarvsfólkið í Danmark.

Vinarliga vegna

Silja i Liða, ljósmóðir
Hildigunn Steinhólm Højgaard ljósmóðir
Rosa Eð, ljósm.
Margretha Thomsen
Jóna María Thomsen, ljósmóðir
Lillie Eliassen, ljósmóðir
Ephelen, ljósmóðir
Hilary Eden
Bjørg av Rana
Paulina Ekrahamde ljósmóðir
Sanna Hansen ljósmóðir
Joan Niclassen, ljósmóðir
Camilla Byskov Eriksen
Ann Berthelsen, ljósmóðir
Eriksen Mellemgaard
Annika B. Hoydal
Sára J. F. Berg, ljósmóðir

LM-088/2023